# Miða ímóti at virksemið í Føroyum kann sametast við tað, vit hava í Íslandi

**– sigur Ásbjørn Gíslason, stjórin í íslendsku flutningsfyritøkuni Samskip, sum fagnar tvey ára degnum hjá virkseminum í Føroyum.**

Samskip hevur havt stóra framgongd í Føroyum tey tvey árini, ið gingin eru síðani felagið byrjaði av nýggjum at virka í Føroyum. Í fyrstani steðgaðu Samskip aðra hvørja viku í Klaksvík á veg úr Íslandi til Bretland og meginland Europa. Síðani kom Havnin afturat sum atkomustað á veg frá Europa til Íslands. Í hesum døgum steðgar felagið tvær ferðir um vikuna í Føroyum. Virksemið vaks uppaftur meira seinasta summar, tá Samskip ognaði sær frystigoymsluna hjá niðurlendsku flutningsfyritøkuni Kloosterboer. Starvsfólkini hjá felagnum í Føroyum eru nýggju í tali, fýra arbeiða á skrivstovuni í Havn og fimm í frystigoymsluni í Kollafirði.

„Vit hava rokkið sera góð úrslit í Føroyum. Undirtøkan frá okkara viðskiftafólkum hevur verið stak góð og okkum hevur eydnast at fingið frálík starvsfólk, ið hevur gjørt eitt megnararbeiði,“ sigur Ásbjørn Gíslason, tann ungi stjórin í Samskip. Seinasta ár avgjørdi hann at flyta frá Rotterdam til Reykjavíkar, har hann stendur fyri dagliga rakstrinum av felagnum í Íslandi og Føroyum. Frammanundan starvaðist hann í seks ár hjá Samskipum uttanlands, har hann var á odda fyri uttanlandsdeildini hjá felagnum.

### Fjølbroytt flutningsfyritøka í skjótum vøkstri

„Seinastu árini hava verið uppgongutíðir hjá Samskip og nú hava vit sterkar og vælvirkandi rakstraeindir, bæði heima í Íslandi, í Europa og her í Føroyum,“ sigur Ásbjørn. Hann vísir á, at rakstrarinntøkurnar hjá felagnum eru tíggjufaldaðar seinastu 10 árini. Tær vóru stívliga 600 mió. krónum í føroyskum peningi í 1996, t.e. árið, tann veruliga framgongdin hjá felagnum uttanlands kann sigast at hava byrjað. Nú er tann árligi umsetningurin umleið 6 milliardir krónur.

„Okkara virksemi er blivið sera umfatandi og røkkur um allan heimin,” sigur stjórin hjá Samskip. “Vit hava íalt 55 skrivstovur í 22 londum í trimum heimspørtum. Harumframt hava vit umboð kring allan heimin. Vit hava ein flota, sum telir umleið 50 skip, og harafturat stóran bingjuflota og nógvar goymslur. Hvønn dag koyra í miðal 1.500 bingjubilar fyri okkara rokning vítt og breitt um Europa.“

“Nógv arbeiði liggur aftanfyri framstigini, sum eru gjørd hjá felagnum seinastu árini. Tey eru úrslitini av miðvísari samskipan og planlegging,” leggur Ásbjørn afturat. „Vit byrjaðu uttanlanda virksemi okkara í smáum við at keypa partar í fyritøkum, eitt nú norska frystiskipafelagnum Silver Sea, týsku meklingini Sotra og estlendsku bingjuflutnings-fyritøkuni TECO. Stór stig vóru tikin seinasta ár, tá vit keyptu niðurlendska skipafelagið Geest North Sea Line. Nakað seinni keyptu vit bretska skipafelagið Seawheel og frystigoymslurnar hjá niðurlendsku fyritøkuni Kloosterboer.“

Tað gekk skjótt framá hjá Samskipum í fjør. Við ársbyrjan fór felagið undir at nýta nýggju 28.000 ferm. høvuðstøðina, felagið eigur í Íslandi – ta størstu vørumiðstøðina í landinum. „Og hetta er ikki øll søgan,“ sigur ein errin Ásbjørn. „Vit fingu eisini tvey nýggj skip í fjør, Arnarfell og Helgafell, sum vóru smíðað fyri Samskip. Hesi skipini taka sær av Føroya- og Europa-siglingini saman við tveimum øðrum skipum, Akrafell og Hvassafell,“ sigur hann. Hann leggur afturat, at bæði hesi skipini sigla undir føroyskum flaggi. „Av rakstarligum orsøkum vórðu bæði hesi skipini skrásett her í Havn.“

### Ætlanin at økja marknaðarlutin í Føroyum

Hóast tað nógva og umfatandi virksemið metir Ásbjørn, at góðir møguleikar eru fyri Samskip at økja um virksemið, serliga uttanlands. Oddamennirnir hjá felagnum hava sett sær fyri at blíva størsta flutningsfyritøkan á hesum øki í Europa – og samstundis ein leiðandi fyritøka innanfyri hesa vinnugrein.

„Vit hóma stórar vakstrarmøguleikar her í Føroyum og vit hava góðan hug at økja okkara marknaðarlut soleiðis, at hann fer at liggja á sama støði sum í Íslandi.”

Tá vit spyrja um tann føroyska marknaðin, sigur Ásbjørn at hann líkist nógv tí íslendska. “Høvuðsútflutningurin er fiskur og vanlig nýtsluvøra er tann størsti innflutningurin. Júst sum í Íslandi leggja vit størsta dentin á góðar og tryggar bingjuflutningar fyri at tæna bæði inn- og útflytarum. Fiskaútflytarar eru í góðum sambandi við Bretland, meginlands Europa og eystureftir til Asia. Innflytarar kunnu flyta sínar vørur beinleiðis til Havnina frá europeiska meginlandinum og Skandinavia.“



*Ásbjørn Gíslason, stjóri á Samskip*




*Frystigoymslan hjá Samskip í Kollafirði*

### Økt virksemi innan fyri frystiflutning og størri goymsla í Kollafirði

Flutningur av frystivørum verður alsamt størri partur av virkseminum hjá Samskip. Felagið styrkti munandi um støðu sína á hesum økinum, tá tað keypti frystigoymsluna hjá Kloosterboer í Kollafirði seinasta vár. Felagið keypti eisini goymslur frá Kloosterboer í Noreg og Niðurlondum og í dag eiga Samskip íalt umleið 85.000 tonsa frystigoymslupláss, goymsluplássið hjá felagnum í Íslandi íroknað.

„Goymslan í Kollafirði kanna taka ímóti 7.000 tonsum og nýtslan av henni hevur verið so mikið góð, at vit hava avgjørt at byggja afturat henni soleiðis at vit verða før fyri at møta størri eftirspurningi eftir goymsluplássi í Føroyum,“ sigur Ásbjørn. „Tað eru m.a. reiðarí, sum fiska í Norður Atlantinum. Vit bjóða teimum tænastur í samband við lossing og goymslu av úrdráttum í Føroyum og aðrastaðni, millum annað við at nýta goymsluna í Kollafirði. Eisini fer dótturfyrirtøkan hjá okkum, Silver Sea, at taka sær av fjøltáttaðum frystiflutningi, serliga til Baltisku londini og Russland, úr Føroyum, Íslandi og frá fleiri økjum kring Norður Atlantshavið.“

### Seta kósina móti framhaldandi vøkstri í Føroyum

„Hetta merkir sjálvandi at vit miða ímóti alsamt veksandi virksemi her í Føroyum. Vit hava ymiskar ætlanir og tað yvirskipaða endamálið er at bøta um tænastur og tilboð, bæði viðvíkjandi inn- og útflutningi, frystivøruflutningin og almennu flutningsmeklingina,“ sigur Ásbjørn, ið ikki vil útgreina beint nú, hvørji hesi tiltøkini verða.

---

# Vogabær – sós til allar íslendingar

**Vogabær hevur vunnið sær eitt umdømi, sum ein kendur framleiðari av vælsmakkandi sós og dippi, sum eru vælhóskandi til alla matgerð. Vørurnar eru vælumtóktar fyri sín góða smakk, og fyri tað fríska tilfarið, ið nýtt verður í framleiðsluni**

Fyritøkan sá dagsins ljós í 1976, tá Guðmundur Sigurðsson og Sigrún Ósk Ingadóttir opnaðu ein handil í Vogar, sum varð doyptur Vogabær. Eftir at hava rikið handilin í nøkur ár, fóru tey undir at framleiða ymisk sløg av sós. Seinni seldu tey handilin, og tá broyttist handilin til eina fyritøku, sum framleiddi sós burturav.

Nýggju eigararnir funnu skjótt útav, at teimum tørvaðu størri hølir til framleiðsluna. Í 1988 umbygdu tey hølini, so at tey vuksu frá 180m2 til 300m2. Eisini varð gjørt nógv burturúr at røkja tey strongu heilsufrøðiligu krøvini um reinleika o.a.

Í 1989 keypti Vogabær eina aðra fyritøku, E. Finnson, ein fyritøka sum framleiddi 4 ymisk sløg av sós.

Í 1990 legði Vogabær fleiri sósir afturat út á marknaðin undir navninum E. Finnson. Síðan hevur fyritøkan arbeitt fyri at menna teirra sós og hava framleitt nýggjar vørur til tann krevjandi íslendska góman.




*Vogasósur*

Í dag framleiða tey í Vogabær 4 ymisk sløg av dippum, 3 sløg av E. Finnson majonesi og 10 sløg av E. Finnson sósum, sum eru gjørdar úr súrgaðum róma og majonesi.

Vogabær framleiðir eisini E. Finnson kettjup, E. Finnson søtan sinnop og 8 ymisk sløg av E. Finnson “Opera Sós”. Opera Sósirnar eru sterkar sósir sum eru góðar til pasta, grillaðan mat, bakstur, breyðþinnar og tvíflísir.

Fyritøkan hevur ment framleiðsluháttin sera nógv. At byrja við varð øll framleiðslan gjørd við hond, og tá gekk væl seinni enn í dag. So við og við vórðu ymiskar maskinur tiknar í nýtslu. Hetta førdi við sær, at framleiðslan gekk skjótari og gjørdist meiri effektiv.

Innbjálvingin er framleidd í Íslandi, undantikið glasskrukkurnar, sum verða nýttar til Opera Sósirnar. Tær eru innfluttar úr Danmark.

Hósdagin hin 16.mars í 2000 varð farið undir at byggja nýggj 1300m2 stór hølir í Hafnafirði. Hesi hølir vórðu tikin í nýtslu tann 04. oktober í 2001.

Fyritøkan Vogabær er alsamt vaksandi, og tað sama er við søluni av vørunum. Leiðslan í Vogabær sær eina bjarta framtíð hjá eini fyritøku í vøkstri.